# Fundur fyri TFT-áhugað

Ber veruliga til at kunna fara upp í ein flúgvara ekkaleysur, tá ið tú hevur verið bangin fyrri tí í longri tíð? Ella ber kanska til at fara til tannlæknan uttan at stúra fyri tí í langa tíð frammanundan? Ella er tað ikki tað reina tvætl, tá ið onkur vil vera við, at hon ella hann kann fáa óttan fyri smáum rúmum (klaustrofobi) at hvørva sum døgg fyri sól? Ella at tveita óttan fyri eiturkoppum á bláman? Og soleiðis kundi verið hildið fram at spurt. Men nú ber til at fáa viðgerð fyri hetta og mangt annað í Føroyum, eins og føroyingar kunnu fáa hesa útbúgving her heima, um undirtøka verður fyri tí.

TFT-viðgerðarhátturin, sum kom fram í USA í 1980, hevur víst seg at kunna hjálpa fólki, sum hava ótta, angist ella annan trupulleika at dragast við. Við fáum viðgerðum eru fleiri føroyingar, ið longu hava fingið hjálp, bæði fyri hæddarræðslu, flúgviræðslu, ræðslu fyri smáum rúmum, ræðslu fyri vatni, og teir hava fingið hjálp fyri mong onnur fyribrigdi, t. d. lesitrupulleika, pínu osfr.

Lat tað kortini vera sagt, at sjálvandi eru sjúkur ella brek, har hesin viðgerðarháttur má lúta, men hann hevur kortini víst seg at hjálpa skjótt og uttan heilivág í fleiri førum, har aðrir viðgerðarhættir hava givið skarvin yvir, ella viðgerðin krevur longri tíð.

Nú verður aftur høvi at fara undir útbúgvingina til TFT-viðgera í Føroyum. Sjálv útbúgvingin gongur yvir 3 vikuskifti, sum eru í august, oktobur og novembur í ár. Afturat sjálvari útbúgvingini kemur starvsvenjing, har høvið verður at royna tað, sum ein hevur lært.

Í lýsing aðrastaðni í blaðnum ber til at fáa gjøllari at vita, hvagar ein skal venda sær fyri at fáa viðgerð, ella hvussu ein skal bera seg at, um ein ætlar sær at fara undir sjálva útbúgvingina. Fundurin, ið er ókeypis, verður sunnukvøldið 26. juni í Slættanesgøtu 5.

Tilmelding á tlf. 318821 ella 218777. Á fundinum fæst at vita, hvussu borið verður at, um einum tørvar TFT-viðgerð fyri eitt hvørt, ella um TFT-útbúgvingin hevur áhuga.

Meiri fæst at vita um TFT á heimasíðuni: www.tftdanmark.dk





Vinnuhúsið søkir samskipara

## Megnar tú at halda skil á arbeiðsmarknaðinum?

Vinnuhúsið sóknast eftir einum samskipara til at umsita arbeiðsmarknaðar- og sáttmálaviðurskifti. Viðgerð og greining av sáttmálaspurningum og sáttmálasamráðingum verður ein avgerandi táttur í arbeiðnum, og uppgávan hjá samskiparanum er at vegleiða vinnufeløgum og føroyskum virkjum.

Starvið fevnir um arbeiðsmarknaðarøkið í breiðum týdningi. Samskiparin umsitur teir sáttmálar, sum skipa privata arbeiðsmarknaðin. Hann luttekur í nevndum og arbeiðsbólkum, ið viðgera arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Hann viðger lógir og kunngerðir, ið ávirka vinnuna og arbeiðsmarknaðin. Og hann røkir málsviðgerð og skrivarauppgávur fyri nevndir í vinnufeløgunum.

Samskiparin fær sostatt møguleikan fyri at ávirka ta leið, sum føroyski arbeiðsmarknaðurin fer, og hann er í stóran mun tann, ið svarar virkjum upp á spurningar um sáttmálar og arbeiðsmarknað.

Fyri at røkja starvið til lítar krevst sostatt av samskiparanum, at hann dugir væl at samskifta við bæði myndugleikar og føroysku vinnuna, sum hann fær tætt samstarv við. Starvið peikar í nógvar ættir, og tí er neyðugt, at tú megnar at halda høvdið kalt, hóast nógv hendir.

Søkir tú, vænta vit av tær, at tú hevur hóskandi útbúgving og neyðugar arbeiðsroyndir. Tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst, samstundis sum tú hevur góð samstarsevni. Tað liggur væl fyri at samskifta, serliga á føroyskum.

Vit bjóða eitt sera áhugavert og avbjóðandi starv í einum mennandi umhvørvi.

Lønin verður eftir avtalu.

Skrivlig umsókn eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. juli 2005. Merk umsóknina ”starv” og send hana til Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen, stjóra, á telefon 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 12 vinnufeløgum, og í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum kann geva politiska ávirkan. Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Smærugøtu 9a, FO-100 Tórshavn, Tel 30 99 00, Fax 30 99 01, industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo


## Brúðarmyndir



*Øllum tykkum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara tann 1. januar 2005 takka vit hjartaliga.*

**Emma og Uni**



*Hjartaliga takka vit øllum, sum vóru við at gera okkara hjúnabandsgag, 2. okt. 2004, so hugnaligan. Takk fyri gávur, blómur og fjarrit. Ein stór tøkk til tykkum, sum hjálptu til og gjørdu dagin so minnisríkan*

**Kærar heilsanir Rudi, Søren og Jens Erik**

Sosialurin i Sosialurin Sosialurin Sosialurin